# Stríðið um Darius ikki liðugt

*Hóast FSF hevur gjørt úrskurð í málinum, so meta vágamenn seg framvegis ikki vera lidnar í málsviðgerðini*

JÁKUP MØRK

Sum vit skrivaðu í blaðnum í farnu viku, so eru vágamenn alt annað enn nøgdir um, at B36 skal vera strokið avstað við Darius Magdisauskas, sum í fyrru hálvu var ein týdningarmikil leikari hjá FS Vágum.

**Hótta við endurgjaldskravi**

Tað, sum serliga var orsøk til ónøgdina, var, at vágamenn søgdu B36 hava gingið aftur um bakið á sær, meðan leikarin var sáttmálabundin at FS Vágar.

FSF hevur tó gjørt úrskurð í málinum, og hava teir útflýggjað B36 spæliloyvi hjá leikaranum, afturímóti at B36 rindar FS Vágum 10.000 kr. umframt tær beinleiðis útreiðslur, sum FS Vágar hevur havt av leikaranum.

Skrivi frá vágamonnum er soljóðandi:

»Vísandi til tíðindi, ið útvarpsmaður bar okkum fyrrapartin í dag, sum Hr. Ísak Mikladal, aðalskrivari FSF's í kvøld kundi vátta, um at FSF hevur útskrivað B36 spæliloyvi til leikara okkara, Hr. Darius Magdisauskas, skulu vit boða frá, at hetta er gjørt, uttan at FSF hevur vent sær til okkara um at leysgeva leikaran og tískil uttan okkara tilsøgn. Tá tað heldru ikki hevur eydnast okkum at fáa vátttað, nær, hvussu og av hvørjum henda avgerð er tikin, meta vit, at útskriftin av nýggja spæliloyvinum er ólóglig.

Tá vit meta at hetta saman við øðrum viðurskiftum er greitt brot á lógir, reglugerðir og siðvenju annars, skulu vit hervið boða frá, at vit í komandi viku í samráð við sakførara koma at at kæra hesa avgerð og reisa endurgjaldskrav móti FSF.

Somuleiðis skulu vit boða frá, at skuldi B36 nýtt nevnda leikara í landskappingardysti frá í dag at rokna, vilja vit kæra við tí fyri eyga, at B36 verður dømt at tapa viðkomandi dystir og annars verður straffað sambært lógum FSF's eins og rinda okkum endurgjald.

Hetta er við hesum fráboðað

PS. Havandi stutta skotbrá okkara í huga, skulu vit somuleiðis boða frá, at vit ein av fyrstu døgunum koma at senda skriv til UEFA um nevndu viðurskifti. Avrit verður at senda til Akademisk Boldklub.«

**Ikki góðkendur**

Ísak Mikladal, aðalskrivari í ÍSF, sigur við Sosialin, at eftir hansara tykki er talan als ikki um nakað ivamál.

Hann vísir til § 1 í reglugerðini fyri góðkenning av leikarasáttmálum, har tað stendur soleiðis: »Sambært kappingarreglunum fyri fótbólt, grein 15 stk. 3 skulu bindandi avtalur millum leikara og felag altíð góðkennast av FSF«.

Ísak Mikladal vísur á, tað, sum er hent í hesum málinum, er, at FSF als ikki hevur fingið tilsent sáttmálan, sum Darius Magdisauskas hevur gjørt við FS Vágar.

Ikki fyrr enn trætumálið millum feløgini bæði byrjar, verður avrit av sáttmálanum sent FSF, men tá er hesin avvístur, vísandi til § 4 í somu reglugerð: »Felagið hevur skyldu at senda leikarasáttmálan til góðkenningar í seinasta lagi 7 dagar eftir, at sáttmálin er undirskrivaður. Verður henda freist ikki hildin, er leikarin frígjørdur frá skyldum sínum sambært leikarasáttmálanum.

Út frá hesum vísir Ísak á, at teir hava viðgjørt málið, sum um talan var um áhugaleikara, og at teir tí útskrivaðu spæliloyvi, treytað av rindan av 10.000 kr. + skjalprógvaðar útreiðslur, sum FS Vágar hevur av leikaranum.

Víðari sigur aðalskrivarin, at reglugerðirnar hjá FSF í hesum sambandi eru í tráð við altjóða galdandi reglur, og at hann tískil ikki dugur at síggja nakra sum helst nyttu hjá vágamonnum at seta seg í samband við UEFA.

Hinvegin vísur hann á, at í roynd og veru kann FSF hinvegin sekta FS Vágar, tí teir ikki hava hildið seg til reglurnar um góðkenning av leikarasáttmálum.

Sambært aðalskrivaranum hjá FSF er sostatt líkt til, at meira ikki hendir í málinum, og so er spurningurin, um vágamenn sláa seg til tols við hesum.



*Hóast vágamenn enn ikki hava góðtikið skiftið, so spældi Darius við B36 leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



## Njósnaðust

Hóast føroysk lið ikki verða roknað fyri nakað serligt í altjóða fótbólti, so ræður kortini um at fyrireika seg.

Hesin njósnarin skrivaði dúgliga, tá B36 sunnudagin spældi móti B68. Hósdagin skal B36 royna seg í Gladsaxe móti oddaliðinum í Superliguni, AB.

## FCK áhugað í svenskum áleypara

**Danmark:** FC Keypmannahavn og sviin Pascal Simpson er komin nær einum sáttmála

Í farnu viku var ein svenskur álopsspælari á vitjan í FC Keypmannahavn. Orsøkin til hesa vitjan var, at FCK er áhugað í at gera sáttmála við mannin, sum spælir í álopinum hjá norska felagnum Vålernenga í løtuni.

29 ára gamli Pascal Simpson hevur tveir landsdystir fyri Svøríki á baki, og hann er hugaður at skifta til FCK.

– Eg havi hugt eftir umstøðunum í FCK, og eg havi hitt venjaran hjá teimum. Felagið er sera áhugavert, sigur Pascal við norskar fjølmiðlar.

Pascal Simpson hevur sáttmála við Vålerenga til oktober mánað, tá norska kappingin endar. Eftir hetta kann hann skifta til FC Keypmannahavn, uttan at felagið skal gjalda nakað fyri hann.

Tó er tað okkurt sum bendir á, at FCK er sinnað at gjalda fyri at fáa Pascal til felagið beinanvegin. Tá Vålerenga fyri tveimum árum síðani keypti Pascal í AIK Stockholm máttu teir av við seks milliónir krónur fyri myrka álopsspælaran.

Pascal hevur skotið tvey mál fyri Vålerenga í 13 dystum, men hann sigst hava harðasta skotið í norskum fótbólti, og hann hevur lagt upp til nógv mál hjá Vålerenga.

*ek*

## Hillerød vann fyrsta dystin

Sunnudagin var fyrsta umfar í bestu donsku fótbóltsdeildini hjá kvinnum. Hillerød, sum hevur tveir føroyskar spælarar í hópinum, vann dystin ímóti Vejle.

Dysturin endaði við 5-0 sigri til Hillerød, sum var á odda 3-0 í hálvleikinum.

Hillerød hevur í summarsteðginum fingið ein nýggjan hálendskan spælara, og hon gjørdi vart við seg beinanvegin. Sandra Doreleijer, sum hon kallast, skoraði bæði til 1–0 og 3–0.

Seinasta málið hjá Hillerød gjørdi Lisbeth Thurect Hansen, sum í juli mánaði var í Føroyum, tí ætlanin var at hon skuldi spæla á KÍ-liðnum í steypafinaluni.

**ek**

variant

Galvaniseraðir viðfestisvognar



Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

www.wenzel.fo

Ford

STARV sosialurin

## Blaðfólk til Sosialin

Hevur tú hug at royna teg á einum arbeiðsplássi, har tað er ferð á allan dagin, har ein deadline er ein partur av hvørjum einasta arbeiðsdegi,og har tú allatíðina fært nýggjar og spennandi uppgávur. So er hetta kanska møguleikin hjá tær.

Vit hava brúk fyri blaðfólki frá 1. september. Vit bjóða hendingarrík og fjølbroytt starv, har tú gerst partur av eini vælvirkandi redaktión og sleppur at royna teg við alskyns uppgávum.

Tað er ein treyt, at tú dugir at orða teg lætt og neyvt á føroyskum, at tú fylgir við í tí, sum hendir og rørist í samfelag okkara, og tað er ein fyrimunur, um tú hevur kunnleika til teldur.

Sosialurin er eitt blað, har tað hendir nakað. Vit eru allatíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast okkum innan mánadagin 14. august:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Viðmerkjast skal »umsókn«

*Hevur tú hug at frætta nærri um okkara tilboð, kanst tú venda tær til Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra á telefon 211820 ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra á telefon 216409*

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast í dag uml. 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna.

sosialurin sosialurin

HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| TOYOTA CAMRY STC 2.0 (AVHEINTINGAR-TILBOÐ) | 160.000 | Aug. | 1987 | 10.000,- |
| BMW 316 (1.6) | 30.000 | Juli | 1997 | 139.000,- |
| SUZUKI BALENO VAN | 35.000 | Aug. | 1997 | 75.000,- |
| FORD ESCORT DIESEL | 86.000 | Aug. | 1996 | 104.900,- |
| CITROËN BX 1.9 DIESEL | 185.000 | Aug. | 1991 | 65.000,- |
| OPEL ASTRA 1.6 GLS (NÝ SÝNAÐUR) | | Sept. | 1995 | 99.900,- |
| CITROËN ZX 1.9 TD | 99.000 | Apr. | 1997 | 119.000.- |
| CITROËN XANTIA 1.8i 5H | 45.000 | Apr. | 1995 | 110.000,- |
| CITROËN XANTIA 3.0 V6 (BRÚKTBILA GARANTI) | 34.500 | Juni | 1998 | 191.000,- |
| BMW 320i (AVHEINTINGAR-TILBOÐ) | 217.000 | Mai | 1987 | 19.900,- |
| MAZDA 323 1.5 SEDAN (BRÚKTBILA GARANTI) | 2.500 | Mar. | 2000 | 145.000,- |

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!

MITSUBISHI L 200 PICK UP 4X4 2.5 TURBO DIESEL km. 35.000 kr. 119.000,-

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866

Sosialurin - Tel. 311820

## Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. $19^{00}$ til $21^{00}$

☎ 212380

Lesið sosialin sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

## Tórshavnar Ítróttarráð

**Úrslit av drátti 7. august 2000**

1. Byrjanartal: 1382541362
2. Byrjanartal 133131774

**Hesir seðlar hava vunnið:**

| | | |
|---|---|---|
| Vinningur | 1. | 4502 |
| Vinningur | 2. | 6463 |
| Vinningur | 3. | 12637 |
| Vinningur | 4. | 15769 |
| Vinningur | 5. | 8915 |
| Vinningur | 6. | 3912 |
| Vinningur | 7. | 6649 |
| Vinningur | 8. | 5302 |
| Vinningur | 9. | 10833 |
| Vinningur | 10. | 4513 |

Vinnararnir kunnu ringja til
Kristiannu tlf. 319017-312380
Birgir tlf. 310298-311475

## Familie i Danmark søger ung pige – hurtigt!!!

Vit er en familie på fire, Dorthe (31), jordemoder, Mads (34) lærer, Jeppe (3), går i børnehave og Aksel på 8 mdr.

Vi søger en pige som kunne tænke sig at komme og bo hos os og passe børnene og hente og bringe i børnehaven. Dine arbejdstider vil være skiftende pga. Dorthes arbejdstider, og der vil være mulighed for enkelte fridage, udover weekenderne; dog vil der også være behov for at du kan passe børnene en enkelt aften. Ring til os snarest!!! Vi har tlf. nummer 0045 86888630.

## Lærari

Vegna farloyvi verður søkt eftir lærara í tíðaravmarkað fulltíðarstarv í Tórshavnar Kommunuskúla beinanvegin.

Upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá skúlastjóranum.

Umsóknarfreist: 12. august.

**Tórshavnar Skúlaráð**

Halt sosialin